ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

8. november 2021
Mál: 21/22254-3
Tygara Skriv:
Viðgjørt: BÁT

Nr. 52-071/2021

Svar uppá § 52a fyrispurning nr. 52-071/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, um bíðilistar í Almannaverkinum.

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

1. Hvussu nógvir borgarar eru á bíðilista til ávikavist endurvenjing, viðlíkahaldsvenjing, taluvenjing, góðu tilgongdina (heimaráðgeving), virknistilboð (vard verkstøð), Megna títt lív, stuðul, umlætting og bústað hjá Almannaverkinum?

Svar:

Endurvenjing
Fýra borgarar bíða eftir at koma í venjing. Umsóknirnar eru játtaðar, og venjingarskeiðini verða sett í verk so hvørt terapeutarnir hava tøkar tíðir.
Harafturat bíðar Almannaverkið í løtuni eftir 5 borgarum, sum skulu byrja uppá endurvenjing, tá ið teir eru lidnir við viðgerð í t.d. sjúkrahúsverkinum og skulu hava endurvenjing frá Almannaverkinum.

Taluvenjing
Játtanin til endurvenjing hækkaði í 2018 við kr. 250.000 á fíggjarlógini við endamálinum at veita taluvenjing til teir borgarar, sum hava fingið játtað endurvenjingarskeið, og sum afturat øðrum førleikum eisini hava brúk fyri at venja samskiftisførleikarnar. Málbólkurin er tann sami sum til endurvenjing, tvs. at borgarin skal vera í aldrinum 18-66 ár og endamálið skal vera at betra um útlitini fyri, at borgarin kemur út aftur á arbeiðsmarknaðin og gerst sjálvbjargnari og virknari í heima- og frítíðarlívinum. Endurvenjing, eins væl og taluvenjingin í tí sambandinum, er tíðaravmarkað. Almannaverkið hevur keypt taluvenjing frá privatum veitara eftir tørvi, og upplýst verður, at ongin borgari bíðar eftir talu ella samskiftisvenjing í løtuni. Tað hevur yvirskipað gingið væl at fingið í lag samstarv við privatu veitararnar, sum seinastu 2 árini hava verið førir fyri at seta talu og samskiftisvenjing inn, svarandi til borgarans tørv.

Viðlíkahaldsvenjing
Seks borgarar bíða eftir at koma til viðlíkahaldsvenjing. Umsóknirnar eru játtaðar, og fýra av hesum eru planløgd at byrja í komandi viku. Tveir borgarar eru í øðrum venjingartilboði/ella

hava ynski um at útseta venjingarbyrjan í Almannaverkinum. 2 borgarar eru á bíðilista til viðlíkahaldsvenjing.

13 umsóknir um venjing eru innkomnar og eru í ferð við at verða málsviðgjørdar.

Tann góða tilgongdin
Deildin Børn og Ung á Almannaverkinum samskipar Ta góðu tilgongdina (TGT), sum er skipað til familjur við barni við autismu. Tað eru í løtuni 235 virkin TGT mál á deildini. Málini koma til deildina ávikavist frá barna- og ungdómspsykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum og frá familjum, sum venda sær beinleiðis til Børn og Ung. Hetta eru familjur, sum antin flyta til Føroyar og hava barn við autismu, ella familjur, sum hava verið á sjúkrahúsið uttanlands, og barnið har hevur fingið staðfest diagnosu innanfyri autismuspektrumið. Upplýsast kann, at eingin bíðitíð er til TGT.

Ein partur av TGT er námsfrøðiliga tilboðið um Heimaráðgeving, sum er til familjur, sum hava heimabúgvandi børn 0-18 ár, ið hava fingið staðfest autismu. Í sambandi við TGT eru fýra ráðgevar settir, svarandi til 3,15 ársverk. So at siga allar áheitanir koma umvegis deildina Børn og Ung. Eingin bíðilisti til hetta tilboðið í løtuni.

Heimaráðgeving
Heimaráðgevingin hevur eisini eitt námsfrøðiligt tilboð til familjur, ið hava heimabúgvandi børn 0-18 ár, sum hava ADHD/ADD. Viðvíkjandi ADHD/ADD eru nú tveir ráðgevar í starvi svarandi til 1,75 ársverk. Sum nú er, fyriheldur Heimaráðgevingin sær til allar umbønir, so hvørt sum tær koma inn. Avtala er gjørd við deildina Børn og ung um at senda eina áheitan til Heimaráðgevingina, við samtykki frá foreldrunum, tá mett verður, at ein familja hevur fyrimun av ráðgeving frá Heimaráðgevingini. Barna- og ungdómspsykiatriin er byrjað at senda innbjóðingar til netfund beinleiðis til Heimaráðgevingina, soleiðis at Heimaráðgevingin kann vera við, tá barnið/tann ungi er liðugt útgreinaður fyri ADHD/ADD. Tað eru eisini foreldur, ið venda sær beinleiðis til Heimaráðgevingina.

Higartil hava 32 familjur (ADHD/ADD) samband við Heimaráðgevingina, og talið veksur støðugt.

Megna títt Lív

Endamálið við Megna títt lív (MTL) er *"at lofta ungum við svárum sosialum ella sálarligum trupulleikum og álvarsligum rústrupulleikum"* (amr.fo). Bíðilistin til tænastu frá MTL er 18 fólk. Tað er individuelt, hvat tey á bíðilistanum til MTL tørva.

Trivnaðartænastur

Trivnaðartænastur hjá Almannaverkinum eru tænastur so sum umlætting, stuðulstænasta, virknistilboð, vart bútilboð og bú- og viðgerðartilboð.
Hetta eru bíðilistarnar í løtuni:
40 eru á bíðilista til virknistilboð, harav sjey búgva hjá Almannaverkinum.
46 eru á bíðilista til stuðulstænastu.
43 eru á bíðilista til umlætting.

167 eru á bíðilista til bústað. Tey, sum búgva hjá Almannaverkinum frammanundan, men ynskja annan bústað, eru ikki tald við (tey eru 22 í tali).

Tórshavn 8. november 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður í almannamálum